## Icelandic keypir í Kina




Íslendska fiskasølufelagnum Icelandic, sum er eitt av heimsins størstu, vantar rávørur. Tí hevur felagið nú keypt seg inn í eitt kinverskt felag, sum fæst við aling. Íslendska felagið hevur drúgvar royndir innan sølu av villum fiski, men er nú til reiðar at gera uppaftur meira burtur úr aldum fiski. Felagið væntar, at nógv fer at henda innan aling av ymiskum fiskasløgum tey næstu árini. (-vilmund)

## Álop á norskan laks

Ein av fremstu monnunum innan russisku fiskivinnuumsitingina, Andrej Krajnij, hevur endurtikið skuldsetingarnar um, at norðmenn brúka ivasom tilsetingarevni í alingini av laksi. Hetta sigur hann við stóra russiska blaðið, Izvestija, Andrej Krajnij er ikki hvør sum helst. Hann er stjóri í russisku fiskivinnuumsitingini, og tí kenna norðmenn hetta sum rættiligt álop á norskan alifisk. Umframt at leggja norðmenn undir at brúka ivasom tilsetingarevni, sigur russin, at norðmenn eisini brúka mjøl úr dýrabeini í fóðrinum. Hann heldur tí, at norski laksurin kann vera skaðiligur sum mannaføði. - Man veit jú ikki, hvat kann henda um eini 20-30 ár, um fólk eta norskan laks, sigur russiski fiskivinnustjórin. Norðmenn eru ikki fegnir um russiska ”álopið” á laksin og afturvísa staðiliga, at norskur laksur verður fóðraður við mjøli úr dýrabeini. (-vilmund)

# Út í heimin at »branda« Føroyar



**- Herferðin hjá umhvørvisfelagsskapum er øgilig. Ágangur er á brúkaran, sum verður gjørdur meira enn tilvitaður um havumhvørvið, og hvussu tað verður umsitið. Hetta er ein veruleiki, og tí mugu vit saman út í heim at gera kunnugt, at Føroyar skikka sær væl, tá ið ræður um burðardygga veiði, sigur Ólavur Jøkladal**

SPORFØRI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


*Ólavur Jøkladal er skrivari í Føroya Ráfiskaseljarafelag og skrivstovustjóri í Føroya Reiðarafelag*

Ólavur Jøkladal, sum er skrivari í Føroya Ráfiskaseljarafelag og skrivstovustjóri hjá Føroya Reiðarafelag, hevur um dagarnar grein á heimasíðuni hjá Føroya Ráfiskaseljarafelag um burðardygga veiði, sporføri og gjøgnumskygni.

Hann vísir á, at í hesum døgum verður nógv tosað um burðardygga veiði, hvussu vit mótvegis brúkaranum kunnu náa út við boðskapinum um, at okkara tilfeingi verður væl umsitið, og at veiðan harvið er á burðardyggum grundarlagi.

### Hava amboðini

- Vit hava amboð at taka til fyri at skjalprógva, at alt fer skilagott fram á hesum øki. Vit kunnu vísa á eina eindømis fiskidagaskipan, ið borgar fyri, at tilfeingið verður framúr væl umsitið. Sporførisskipan er eisini á veg, sum verður sjálv skjalprógvanin fyri burðardyggari veiði. Sum er, verður sagt frá allari veiðuni, fiskiskapurin er reguleraður, og fiskur verður so gott sum ikki tveittur fyri borð, tí miðað verður eftir at gagnnýta alt. Tað, sum ræður um, er at skjalprógva hetta fyri brúkaranum og at fáa boðskapin út., sigur Ólavur Jøkladal.

Hann vísir á, at herferðin hjá umhvørvisfelagsskapum er øgilig.

- Ágangur er á brúkaran, har hann verður gjørdur meira enn tilvitaður um havumhvørvið, og hvussu tað verður umsitið. Hetta er ein veruleiki, vit mugu síggja í eyguni og eiga at taka støðu til. Tað hevur tí stóran týdning, at farið verður út í heim at gera kunnugt, at Føroyar skikka sær væl, tá ið ræður um at geva upp veiði, at regulera fiskiskapin, og at vit gagnnýta tilfeingið optimalt. Hetta ger, at vit tora at taka hetta heitið á okkum, sum er “burðardygg fiskiveiða”.

### Sporførisskipan

Ólavur sigur, at tað er her, at sporførisskipanin kemur okkum til hjálpar - at skjalprógva fyri brúkaranum, at alt er eftir “bókini”.

- Endamálið við skipanini er at spora fiskin heilt frá tí, hann verður veiddur, gjøgnum øll lið, til hann umsíðir liggur á borðiskinum hjá brúkaranum, soleiðis at fult gjøgnumskygni er í allari tilgongdini heilt “av grunni og at munni”.

Skrivarin í Ráfiskaseljarafelagnum vísir á, at eitt nýtt partafelag varð sett á stovn í mars seinasta ár. Hetta felag hevur til endamáls at menna eitt talgilt undirstøðikervi til sporførar skrásetingar frá fiskivinnuni í Føroyum.

- Tað er Ráifiskaseljarafelagið, sum er við í hesi verkætlan. Tað sær út til, at skipanin hevur stóran áhuga millum manna út í heimi, og vænta vit okkum nógv av henni, sigur hann.

Ólavur vísir á, at eydnast tað okkum at fáa boðskapin út og soleiðis sannføra brúkaran um, at alt er í lagi, hava vit harvið avvápnað ógrundaðar pástandir hjá umhvørvisfelagskapunum.

- Teir hava ikki havt sum sítt merki at arbeiða objektivt, men tað verður brúkarans álit, ið vit verða noydd at vinna.

### Út í heim

Hann heldur, at tíðin er komin til, at ein ella annar fer út í heim at “branda” Føroyar.

- At hetta er alneyðugt, munnu flestir vera á einum máli um.

Ólavur Jøkladal er sannførdur um, at tað hevur stóran týdning hjá okkum, at Føroyar verða “brandaðar” ígjøgnum ta komandi sporførisskipanina, soleiðis at vit vinna brúkarans álit, ið hann metir sum tað týdningarmesta av øllum.

Hann vísir á, at kanningar geva føroyingum góð skoðsmál, ið skuldu verið sjálvsøgd at nýtt í eini mótherferð, tí tað eru altíð nøkur, ið ikki vilja okkum væl.

- Í bretskari kanning, sum varð gjørd í mai mánaði í ár, liggja Føroyar ovarlaga millum tey 53 londini, ið mett varð ímillum. Til dømis vóru Føroyar tað landið, ið fekk hægsta stigatal við atliti at hentleikaflaggi. Tí kann staðfestast, at siðalag føroyinga er gott á hesum øki.

Hann leggur aftrat, at tá vit hyggja at samlaða stigatalinum í kanningini, liggur Noreg á fyrsta plássi við 28,5 stigum og Føroyar á øðrum plássi við 27 stigum.

Tað var bretski granskingarstovnurin “Chatham House”, ið stóð fyri kanningini.

Ólavur heldur, at eitt slíkt úrslit eigur at gerast kunnugt millum manna. Tað skal prentast inn í brúkaran úti í heimi, at føroyingar til allar tíðir eru farnir væl um tilfeingið og gera tað enn.

- Sosiala síðan av sakini er eisini ein týðandi liður í

## Tunfiskavinna er í kreppu

**Útboðið av tunfiski er minkað, og tað er eftirspurningurin av ókendum orsøkum eisini. Tað er íslendski bankin Glitnir, sum hevur hesi tíðindi í nýggjari frágreiðing**

Tunfiskaídnaðurin kring um heimin, sum í krónum og oyrum er ein hin mest týdningarmiklasti, er seinastu árini stagneraður.

Eingi útlit eru til bata.

Fleiri orsøkir eru til hesa støðu. Útboðið er minkað, og eftirspurningurin er eisini minkaður av ókendum orsøkum seinastu árini.

Tað er íslendski bankin Glitnir, sum hevur hesi tíðindi við í einari nýggjari frágreiðing.

40 tunfiskasløg eru kring um í heimshøvunum.

Í heimshandlinum av fiskavørum liggur tunfiskur á einum fjórða plássi.



Samlaða útflutningsvirðið av fiska-og skeljavørum var 53 miljardir evrur í 2005, og tað er ST, sum veit um hetta tal at siga.

Vørur úr tunfiski stóðu fyri tilsamans 7,6% av samlaða heimshandlinum av sjómati - ella fyri 4,1 miljardum evrum í 2005.

(-vilmund)